

## *Almenn ergoterapi um eitt ár*

Landsstýrismaðurin í heilsumálum heldur fast um, at ergoterapi til børn skal vera eitt alment tilboð.

Eitt tað seinasti, Aksel V. Johannesen gjørdi sum landsstýrismaður í heilsumálum, áðrenn hann fór í Fíggjarmálaráðið, var at svara einum fyrispurningi frá Birni Kalsø um Ergoterapi til børn.

Og Aksel V. Johannesen heldur eisini, at peningur eigur at verða settur av til almenna ergoterapi á fíggjarlógini fyri 2012, so at henda tænastan kann byrja á nýggjárinum.

Hann sigur, at á privatu viðgerðarstovuni er gjaldið fyri ergoterapi 475,00 kr. um tíman, men at Heilsutrygd kann rinda helvtina og eftir umsókn kann Almannastovan rinda helvtina, annars má borgarin sjálvur rinda helvtina.

Tá ergoterapi til børn verður almenn, er byrjanarlønin hjá einum ergoterapeuti í almennu skipanini er 136,38 krónur um tíman og endalønin er 154,84 kr. um tíman umframt ávís gjøld.

Í eini almennari skipan verður tænastan ókeypis fyri borgaran.

Um tilboðið um ergoterapi til børn verður skipað sum eitt alment tilboð, fer at bera til at seta fleiri starvsfólk í starv fyri somu játtan og tað fer at hava við sær, at tað fer at bera til at veita tilboð um ergoterapi til enn fleiri børn.

- Eitt av endamálunum við at skipa ergoterapi sum eitt alment tilboð er, at so ber til at skipa hetta sum eitt tilboð kring landið ístaðin fyri bara í Havn, sum nú.

- Sum støðan er nú, er viðhvørt so langt hjá børnum at fara til ergoterapi, at vandi er fyri, at summi ikki taka av tilboðnum um ergoterapi, hóast tey kundu havt tørv á tí.

- Tá ergoterapi til børn verður skipað sum eitt alment tilboð landið, fer hetta at hava við sær, at børn, óansæð hvar í landinum tey búgva, fara at hava javnbjóðis atgongd til ergoterapi, sigur Aksel V. Johannesen.

# Hólmgongumenn




Dysturin um formanssessin í Javnaðarflokkinum er byrjaður

## Í MORGIN

*9/12 °C*



14-19 m/s 13-18 m/s

Strúkur í vindi upp í hvassan vind av útsynningi, eitt skifti møguliga skrið. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 9 og 12 stig.

## FRÍGGJADAGIN

*4/7 °C*



14-19 m/s 14-19 m/s

Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

## LEYGARDAGIN

*4/7 °C*



11-16 m/s 11-16 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 956 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani til Føroyar fer í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og gevur framvegis nógvan vind á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 95 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -5 | **Tromsø** | -- | **Moskva** | 0 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 2 | **Bergen** | 0 | **Berlin** | 5 | **Beijing** | 0 |
| **Tórshavn** | 4 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 13 | **New Dehli** | 19 |
| **Lerwick** | 3 | **Stokkhólm** | -4 | **Madrid** | 8 | **Bangkok** | 31 |
| **Aberdeen** | 4 | **Keypmannah.** | 0 | **Róm** | 13 | **Sydney** | -- |
| **London** | 13 | **Helsinki** | -6 | **Malorca** | 16 | **New York** | 0 |

## VESTFALLSKYRRINDI

18. febr. Fullmáni
19. febr. Mánin næstur jørðini
24. febr. Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. feb. | 10:32 | 23:13 | 09:32 | 22:13 | 09:47 | 22:28 | 00:05 | 12:32 | 01:05 | 13:32 | 08:47 | 21:28 | 07:47 | 20:28 | 10:47 | 23:28 | 11:47 | - | 10:17 | 22:58 | 11:32 | - |
| 24. feb. | 11:54 | - | 10:54 | 23:35 | 11:09 | 23:50 | 01:13 | 13:54 | 02:13 | 14:54 | 10:09 | 22:50 | 09:09 | 21:50 | - | 12:09 | 00:28 | 13:09 | 11:39 | - | 00:13 | 12:54 |
| 25 . feb. | 00:35 | 13:16 | - | 12:16 | - | 12:31 | 02:35 | 15:16 | 03:35 | 16:16 | 11:31 | 23:58 | 10:31 | 22:58 | 00:50 | 13:31 | 01:50 | 14:31 | 00:20 | 13:01 | 01:35 | 14:16 |
| 26. feb. | 01:43 | 14:10 | 00:43 | 13:10 | 00:58 | 13:25 | 03:43 | 16:10 | 04:43 | 17:10 | - | 12:25 | 11:25 | 23:50 | 01:58 | 14:25 | 02:58 | 15:25 | 01:28 | 13:55 | 02:43 | 15:10 |
| 27. feb. | 02:35 | 15:01 | 01:35 | 14:01 | 01:50 | 14:16 | 04:35 | 17:01 | 05:35 | 18:01 | 00:50 | 13:16 | - | 12:16 | 02:50 | 15:16 | 03:50 | 16:16 | 02:20 | 14:46 | 03:35 | 16:01 |